# Nøvn

## Jóannes Eidesgaard 60 ár

Í gjár gjørdist Jóannes Eidesgaard seksti ár. Jóannes hevur í meira enn 20 ár røkt ein hóp av álitisstørvum vegna Javnaðarflokkin. Hann var valdur á ting í 1990, og árið eftir í 1991 gjørdist hann landstýrismaður í heilsumálum. Truplu kreppuárini 1994-1996 stjórnaði hann fíggjarmálum. Meðan arbeiðsloysi og húsagangir vóru gerandisfyribrygdi, var hann við til at leggja lunnar undir ALS skipanina. Ein skipan sum gjørdist trygdarnetið hjá vanliga føroyinginum í kreppuárunum.



Í 1996 var hann valdur at umboða flokkin á ovastu rók, tá ið hann tók við sum formaður fyri Javnaðarflokkin. Hann var andstøðuleiðari frá 1998-2001. Undir hansara leiðslu var flokkurin sera sjónligur og virkin í andstøðu. Í 1998 – 2001 umboðaði hann flokkin á Fólkatingi. Viðurskiftini millum Føroyar og Danmark vóru trupul í 1998 orsakað av bankamálinum. Tað eydnaðist Jóannes saman við Maritu Petersen at tala okkara søk á ein slíkan hátt, at ein sømulig og góð loysn fyri Føroyar var endin av bankamálinum.

Í 2004 var Jóannes valdur til løgmann, eftir at hann hevði skipað samgongu saman við Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum. Sum løgmaður røkti hann uttanríkismál og fekk í lag Hoyvíkssáttmálan. Føroysk sendistova var latin upp í Íslandi. Hann stóð sum løgmaður á odda fyri arbeiðinum við visjón 2015.

Stórsta einstaka málið hetta skeiðið var uttan iva, at Samhaldsfasti var styrktur og útbygdur munandi. Í samgonguskeiðinum frá 2004-2008 var ein hin stórsta umfordeilingin framd ímillum inntøkubólkarnar í Føroyum. Av samtykta skattalættanum hesi árini fóru 180 mió inn í Samhaldsfasta, soleiðis at útgjaldið kundi økjast úr 700 kr til tær 2.700 kr, sum tað er í dag. Henda raðfesting av Samhaldsfasta fer óivað at standa sum ein varði fyri eftirtíðina.

Eftir løgtingsvalið í 2008 helt Jóannes fram sum løgmaður, hesu ferð í samgongu við Tjóðveldi og Miðflokkin. Tá ið henda samgonga slitnaði í september 2008, tók Jóannes við sum fíggjarmálaráðharri. Hetta starvið røkti hann til hann í februar 2011 boðaði frá, at hann ynskti at gevast sum fíggjarmálaráðharri og sum formaður floksins.

Jóannes hevur umboðað og tænt Javnaðarflokkinum í nærum øllum álitisstørvum, ið ein politikari kann røkka. At hann hevur nýtt so nógva tíð og orku at umboða Javnaðarflokkin, eru vit honum sera takksom fyri. Hóast hann nú hevur valt ikki longur at standa í fremstu røð, so eru vit vís í, at hann framvegis fer at gera sítt til í floksarbeiðinum. Javnaðarflokkurin ynskir Jóannesi hjartaliga til lukku við degnum og vónar, at hann og Anita fáa nøkur góð ár saman við familjuni, nú hann hevur valt at nýta meira av síni tíð saman við sínum nærmastu. Hjartaliga til lukku við teimum seksti árunum og blíðan byr framyvir.

**Javnaðarflokkurin**




## Joel stjóri á Posta

Nevndin á Posta hevur gjørt av at seta Joel undir Leitinum sum stjóra í fyritøkuni, og tekur hann við starvinum 1. mai 2011.

Joel undir Leitinum er 39 ára gamal og er Cand. Merc. frá 1998 við sergrein í fígging og roknskapi frá Handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

Í 2004 tók Joel við sum stjóri hjá Samskipum í Føroyum, har hann starvaðist í 6 ár. Hann hevur frammanundan eisini starvast á Føroya Fiskasølu við ábyrgd av sølu og produktum til retail og catering, og sum Sølu- og Marknaðarleiðari hjá Eimskip. Joel kemur úr einum starvi sum leiðari av Corporate Finance deildini í Bank Nordik.

Joel hevur viðkomandi leiðsluroyndir, førleikar á sølu- og marknaðarøkinum, og hollan kunnleika um inn- og útflutningsvinnuna í Føroyum.

Nýggi stjórin tekur við eftir, at Sofus Clementsen, á heysti 2010, valdi at leggja frá sær. Í tíðarskeiðnum 15. oktober 2010 til 1. mai 2011, hevur Hjørdis Viberg virkað sum stjóri á Posta og fer hon nú aftur í starvið sum rakstrarstjóri í fyritøkuni.

## Tríggjar kvinnur við nýggjum bókum

Ofta hoyra vit at yngra ættarliðið av føroyskum høvundum ikki eru komin fyri seg. Serliga ofta hoyra vit eftirlýsingar av yngri kvinnuligum rithøvundum í Føroyum. Tað er tí ein fragd at kunna kunngera, at vit hava útgivið ikki minni enn tríggjar yngri føroyskar kvinnuligar debutantar í senn.Tvey yrkingasøvn og eitt prosaverk.

Tað skrivar forlagið Eksil í einum tíðindabrævi.

– Vit hava allantíðina vilja at Forlagið Eksil kom at útgeva yngri debutantar og yngri høvundar, og vit vilja á tann hátt nøra um yngra ættarliðið innan føroyskar bókmentir.

Meiningin er, at allar hesar bøkur skulu kom út í eini røð, sum hevur serligt eykennið.

Vit vóna at hesar útgávur koma at vera ein minnilig hending innan føroyska bókmentaheimin. At útgeva ikki minni enn tríggjar yngri kvinnur samstundis er helst ongantíð hent fyrr í Føroyum.

### Sissal Kampmann: Ravnar á ljóðleysum flogi

Sissal er cand.mag í norðurlenskum. Hon hevur í nógv




ár fingist við at yrkja og at skriva. Hon hevur verið væl fagnað við sínum yrkingum í Vencil. Sissal er vandur fyriskipari og hevur arbeitt fyri nógvar fyritøkur, m.a. Sansir. Hon hevur lisið upp yrkingar til tiltøk, so sum Mentanarnáttina í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, í Vestmanna og í Sirkus í Havn í 2011.

### Vónbjørt Vang: Millumlendingar

Vónbjørt Vang hevur gjørt vart við seg sum fotografur og yrkjari. Hon hevur eisini verið virknan innan føroyska mentan í nógv ár, m.a. við ábyrgd fyri tiltøk á G! Seinni sum ummælari og bókmentaskribentur á m.a. Dimmu, Fregnir og nú á Kvinnu. Hon er upprunaliga útbúgvin bókavørður og var í fimm ár bókavørður í Føroyum. Nú lesur hon Moderne Kultur og Kulturformidling á Københavns Universitet, har hon m.a. hevur gjørt projektir fyri Statens Museum For Kunst. Frá 2007-2009 hevur hon lokið BA innan bókmentafrøði á Københavns Universitet eisini. Í 2009 hevði hon eina fotoframsýning kalla! Memory Scapes í Føroyahúsinum.



Vónbjørt hevur verið til Debutantseminari! á Svenska Rithøvundaskúlanum í Biskops Arnø í 2007.

Seinastu árini hevur hon verið ein partur av bókmentaliga umhvørvinum í Keypmannahavn. Sum yrkjari og týðari er tekstir eftir hana á prenti í Vencil og í Outsider Magazin.

### Daniella Andreassen: Dilemma

Daniella er við at vera eitt sindur kend fyri at hava lagt ógvusligar, ósensureraðar og øðrvisi søgur á sín blogg. Soleiðis at hon á ein hátt ein av Føroya fyrstu føroysku blogghøvundum. Hon hevur eisini lisið upp ymisk støð, m.a. í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Daniella hevur annars royndir sum blaðfólk í Føroyum. Hon hevur lisið eitt skifti á Føroyamálsdeildini, men býr í Århus í løtuni.

Bókin Dilemma er hugtakandi og ein óvanliga sterk bók um eina unga kvinnu, sum eigur børn og mann, men er í kreppu. Hendan bókin er erlig og óføroysk á tann hátt, at høvundin torir at taka upp evnir, sum vanliga ikki eru at lesa á skrift í Føroyum, so sum erligar lýsingar av kynslívi og hvussu torført tað er at vera mamma. Høvundin er útiseti, og tað er røddin eisini í bókini, og hetta sæst aftur í bókini málsliga, tí hon er við vilja skrivað á einum blandingsmáli, sum kann fáa nakkahárini at reisa seg hjá før-oysktlærarum og málfólkum.




Dilemma er ein óvanliga djørv, frek og húðleyst erlig bók um modernaðar kvinnulagnur í okkara tíð. Prosaskaldskapur meiri í ætt við Victoriu Wild, Silviu Henriksdóttir enn Heðin Brú og Chr. Matras.